# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar

15. juli fingu Susanna Jacobsen og Hávardur Johannesen, Argjum, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3800 gr.

16. juli fingu Sunnuva og Axel Poulsen, Sørvági, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3400 gr.

16. juli fingu Sigga í Garðastovu og Gunnar Holm-Jacobsen, Hoyvík, eina dóttur.

17. juli fingu Allan og Turið eina lítlasystur. Hon var 53 cm long og vigaði 3750 gr. Foreldrini eita Diana og Lars Müller og búgva í Hvalba.

17. juli fingu Jóna og Niclas Petersen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3900 gr.

17. juli fingu Unn Hilduberg og Tróndur Djurhuus, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3950 gr.

18. juli fingu Anita Wang og Ási Potts, Norðskála, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3630 gr.

18. juli fingu Tórgerð H. Jensen og Jóan Petur Clementsen, Sandi, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3600 gr.

19. juli fingu Annetta og Jóhan Andrias Hansen, Runavík, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3550 gr.

21. juli fingu Anita og Atli Vestergaard, Porkeri, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4400 gr.

21. juli fingu Joan D. Kruse og Hans Jákup Johansen, Eiði, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3400 gr.

22. juli fingu Marjun T. Magnussen og Heini Gaard, Argjum, ein son. Hann var 58 cm langur og vigaði 4400 gr.

23. juli fingu Hertha og Martin Kúrberg, Eiði, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 2850 gr.

23. juli fingu Randi Dam Petersen og Palli Petersen, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4550 gr.

## Andlát

17. juli
Kjeld Ellevang, typografur, andaðist í Ålborg, 63 ár
Martin Joen Jacobsen, andaðist í heiminum, 64 ár

19. juli
Gunnhild Müller, Porkeri, 88 ár
Ivan Arge, Argir, 45 ára gamal

21. juli
Sigurd Berghamar, Tórshavn, 92 ár
Sigrid Maria Olsen, Sørvági, 96 ár
Zacharias Olsen,Fuglafjørður, 74 ár

23. juli
Marin Elisabeth Andreasen, Strendur, 86 ár




# Torkil Strøm í Vági 90 ár



Ólavsøkuaftan verður Torkil Strøm 90 ár. Torkil er føddur í Vági 28. juli 1913. Foreldur hansara vóru Niels Petur Strøm, timburmeistari og Maria f. Hjelm - hann var frá Kráir og hon av Løðhamri. Torkil vaks upp á Løðhamri, saman við einum eldri bróðuri, Osvald, og einari yngri systir, Veru.

Ein ung og vøkur genta úr Øravík, sum æt Herborg, var komin í húspláss har í Vági. Torkil og hon komu at kennast og tey giftust tann 18. febr. 1937. Tey búsettust á Løðhamri, og har búgva tey enn tann dag í dag. Tey høvdu ta stóru eydnu at kunna halda krúndiamantbrúdleyp saman fyri hálvumøðrum ári síðani.

Torkil og bróðurin smíðaðu saman við pápa teirra. Teir bygdu hús, og um vetrarnar smíðaðu og umvældu teir umborð á skipunum, tað var altíð nokk at gera. Tey fyrstu áruni eftir seinnra heimsbardaga bleiv tó minni at gera, men tá fór Torkil saman við øðrum timburmonnum til Íslands at smíða nøkur ár. Heimkomin úr Íslandi bleiv hann heilsubrekaður í longri tíð, men hann fall ikki í fátt og kom fyri seg aftur. Hann keypti sær ein lastbil, og tá onki var at koyra arbeiddi hann sum hjálparmaður hjá systkinabarni sínum, Viggo Dahl, sum hevði handilsvirki á Tjørn. Í fleiri ár koyrdi hann olju fyri Esso, til allar bygdirnar í sunnaru helvt og skipini við. Seinnri fór hann at smíða aftur, og hann var kendur sum ein sera raskur smiður. Eitt kundi hann tó ikki fordraga, tað var at skriva rokningar fyri arbeiði, men hann var álitandi og vælgjørdur, og hann fekk altíð sítt.

Hann hevur eisini til ítriv at mála, landsløg einamest, og tað fæst hann eitt sindur við enn hóast hann nú verður 90 ára gamal. Tað eru mangar myndir sum hanga víða hvar í nógvum heimum. Tað, sum hann hevur sæð í nattúruni í okkara vakra landi, tað hevur hann fest á løriftið sera hepnisliga.

Torkil var við at stovna Kirkjukórið Ljómur í Vági. Hetta var í 1939. Herborg kom uppí nakað seinni. Av stovnarunum eru tey nú bara nøkur fá eftir á lívi.

Í nógv ár var Torkil formaður fyri stýrið í missiónshúsinum í Vági. Tá missiónsvika var, høvdu tey altíð fólk gistandi, og nógv mugu tey eisini vera kring oyggjarnar, ið minnast blíðskapin í heiminum hjá honum og Herborg.

Torkil heldur føðingardagin í heiminum saman við familjuni.

Hjartaliga tillukku við 90 ára føðingardegnum!



*Í dag fyllir Kalle Hansen í Klaksvík 70 ár. Myndin er tikin týsdagin umborð á nýggja Skálabergi*

## Kalle Hansen sjeyti

Í dag fyllir Kalle Hansen í Klaksvík 70 ár.

Kalle er føddur og uppvaksin í Puntabyrgi í Trongisvági, sonur Nicolinu f. Petersen og Sofus Michael Hansen, vanliga róptur, Kalle.

Sum ungur fór hann til Klaksvíkar, har hann lærdi til jarnsmið. Útlærdur fór hann til skips og seinni á maskinskúla í Havn.

Kalle er giftur Onnu, dóttir Petru og Hugo Gardar í Klaksvík.

Tey eiga børnini, Petru, Kalla, Jógvan Hugo, róptur Egga og Niels.

Anna og Kalle eiga 10 ommu- og abbabørn.

Meginpartin av arbeiðslívi sínum sigldi Kalle, tey seinastu mongu árini sum maskinmeistari við trolara.

Kalle er álitismaður og tað, sum hann fær litið í hendi, er í góðum hondum. Hann er fyrikomandi, góðsligur og er vælumtóktur maður.

**rs**



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# 100 ára føðingardagur



Tann 27. juli fyllir Hanna Sigurgeirsson (Hanna hjá Dekninum) í Reykjavík 100 ár.

Hanna er ættað úr Sandavági, dóttir Dánjal Jacobsen, oftast nevndur »Deknurin«, úr Sandavági og Rakul av Eiði, nevnd »Eiðis-Rakul«. Av 9 systkjum er Hanna einasta eftir á lívi. Hanna er av ættini »hjá Peri« og er 7. ættarlið frá Per Arabo og Beintu.

23 ára gomul fór Hanna til Íslands at arbeiða á bróstsjúkrahúsinum á Vífilstøðum og tá hitti hon Gunnar Sigurgeirsson av Akureyri, sum var sjúklingur har. Tað rann saman teirra millum, og tá hann varð fluttur á bróstsjúkrahús, sum tá var komi á Kristnesi í Eyafirði, fór Hanna við. Hon var arbeiðsgenta í húsinum hjá einum lækna á Akureyri. Hanna og Gunnar giftust í 1929 og búðu fyrstu árini á Akureyri og fingu tvey børn, Fríðgeir og Erlu.

Gunnar var tónleikalærari, men av tí at ikki var so nógv arbeiði á Akureyri, fluttu tey í 1936 til Reykjavíkar, har hann gav frálæru í sangi og klaverspæli, stjórnaði sangkórum v.m.

Gunnar andaðist í 1970, 69 ára gamal. Síðan búðu Hanna og dótturin, Erla, í stóru húsunum í Drápuhlíð í Reykjavík, til Hanna fyri fáum árum síðan flutti á eitt ellisheim beint uttanfyri Reykjavík og Erla fekk sær lítla íbúð í høghúsum í býnum.

Hanna hevur ótaldar ferðir vitjað aftur til heimbygdina, líka síðan børnini vóru smá og torført mangan var at ferðast. Seinnu tíðina hevur hon ferðast við flogfari, sum henni dámdi sera væl, og seinast hon var her heima fylti hon 97.

Hanna hevur verið sera lívsglað og dugað at sæð og hoyrt alt tað vakra í náttúruni. Hon kundi sita og lurta eftir fossinum uppi við Mataránna og hoyra hann tosa ella ganga inni á sandi og tosa við aldurnar, sum skvatlaðu fyri fótunum á henni meðan hon hentaði sjáldsamar steinar og skeljar. Væl hevur hon dugað at seyma og eisini hevur hon teknað og málað. Evnað úr leiri hevur hon eisini, og í gluggakarminum hjá henni standa 3 flottar damur, sum hon hevur evnað til. At hon er listakvinna er tí ikki ov mikið sagt. Í mun til aldurin má sigast at føðingardagsbarnið er væl fyri. Fyri fáum árum síðan fekk hon skurðviðgerð fyri eyguni, sum vóru farin at bila, og sær nú sum ørnin, tó hoyrir hon ikki væl og far tí ikki longur so nógva gleði av tónleiki, sum henni dámdi so væl. Hon kundi væl hugsað sær at komið heim til Sandavágs at hildið føðingardagin, men tað vilja tey avvarðandi ikki hoyra talan um.

Á føðingardegnum er Hanna hjá dóttrini Erlu Gunn-arsdóttir, Grandavegur 47, Íb. 704, Reykjavík, har okkurt verður at fáa í veitsluhølinum, sum hoyrir til íbúðirnar.

Ég tekki fagran lítinn lund,
hjá læknum upp við foss,
tar sem að gróa gull-litt blóm,
tú gefur heitan koss.

Vit ynskja Honnu hjartaliga tillukku. – Sæl og blessuð, Hanna-frænka.

**Ási**

## Petur Christiansen 80 ár



Mánadagin 28. juli fyllir Peter C. Christiansen, fyrrverandi borgarstjóri í Havn, 80 ár. Hann er havnar-maður, sonur Viggo og Katrinu Christiansen, og hann er giftur við Onnu Poulsen av Strondum.

Petur C, sum hann hevur verið kallaður, er útbúgvin maskinmeistari, hevur handverkaraprógv og elektroinstallatørprógv fyri maskinistar. Í nøkur ár í 50-unum var hann lærari á Sjómansskúlanum, og hann var fyribils settur stjóri og lærari á Føroya Maskinskúla frá 1965-70.

Mest kendur er Petur C frá politiska lívinum. Hann varð valdur í Tórshavnar Býráð fyri Fólkaflokkin í 1960 og var býráðslimur í 20 ár. Í 8 ár, frá 1972-80, var hann býráðsformaður. Tað var í hansara formanstíð, at samgongur vóru skipaðar millum teir politisku flokkarnar í býráðnum og farið varð rættiliga undir at skipa býin við býarætlan og byggisamtykt.

Petur C hevur eisini verið í landspolitikki. Hann varð valdur á ting fyri Fólkaflokkin í Suðurstreymoy í 1966 og var tingmaður í eitt valskeið.

Tey nógvu seinastu árini hevur Petur Christiansen livað illa. Hann hevur verið á Lágargarði í mong ár.

## Dagurin

**26. juli. Anna.** Hon var móðir Mariu Moy og var gift við Jójakimi. Halgisøgan sigur frá, at tey komin upp í árini eingi børn fingu, og Jójakim rýmdi frá konuni. Men hann vendi heim aftur, tá ið ein eingil hevði boðað honum, at tey skuldu fáa barn. Og tá bar til. Hebráiskt navn, ið merkir *hin náðaða ella yndi.*

**27. juli. Marta.** Eitt av systkinunum í Betániu; hon sum gjørdi sær stríð og ónáðir av mongum. Halgisøgan sigur, at Marta saman við systkinum sínum fór til Marseille í Fraklandi, har hon stovnaði eitt kleystur, sum hon livdi í í 30 ár. Aramáiskt navn, sum merkir *húsfrúgv*.

**28. juli. Aurelius,** deyður í umleið 852. Í fæðirætt vóru hann og konan Natalia av mauriskum fólki, men tey vóru í loyndum kristin. Tá ið tey saman við øðrum alment viðgingu kristnu trúgv sína, vóru tey tikin av mauriska emirinum og hálshøgd.

**29. juli. Ólavsøka** verður hildin til minnis um, at norski kongurin Ólavur Haraldsson fell á Stiklastøðum í árinum 1030. Eftir deyða hansara hendu mong undurverk við grøv hansara og skjótt verður hann mettur sum mikið halgimenni og fær navnið *Ólavur hin Heilagi.* Minningardagur hansara varð hildin um øll Norðurlond, men serstakliga í Føroyum hevur dagurin í øldir verið hildin sum mikil hátíðardagur, sum Janus Djurhuus sigur frá:

*Stiklastaða vápnabrestur*
*slongdist yvir havið vestur.*

Ólavsøkan gjørdist tjóðarhátíð okkara. Hon var eyðkend við, at tingið varð sett ólavsøkudag og hildin varð ólavsmessa í Havnar kirkju. Eisini tey árini, tingið varð sett seinni um heystið, var ólavsøkuguðstænasta hildin. Tað er í nýggjari tíð, at ólavsøkuhaldið, sum tað nú er, er íkomið. Tingsetan og guðstænastan eru við sma lag óloysandi partar av ólavsøkuhaldinum. Fríggingarmyrkt sigst vera tveir tímar á ólavsøku.

Ólavur er norrønt navn, ið merkir bæði *ættarfaðir* og *eftirmaður*.

**30. juli. Abdon,** deyður umleið ár 250. Høgt mettur embætismaður í Róm, sum varð tikin av døgum fyri kristnu trúgv sína.

# Preliminerprógv í 1946

### Í 1946 fingu hesi preliminerprógv á VBV á Skansavegi í Havn



*Aftara rað f.v. Petur Skeel Jacobsen, Kaldbak, Jørgðrim Joensen Næs, Miðvágur, Kirsten Olsen, Tórshavn, Julian Sundberg Jensen, Stykkið, Ása Maria Colbjørnsen, Hestur, John M. Hansen (Reinert), Kaldbak, Fremra rað f.v. Eyðun Simonsen, Tórshavn, Katrina Christiansen, Tórshavn, Nancy Sekjær Nielsen, Tórshavn, Henning M.F. Jespersen, Hov.*

*mynd: Petur Skeel Jacobsen*